# Tørvur á lógarbroyting

**Finn Nielsen, stjóri á Føroya Keypsamtøku, fegnast um, at okkurt endiliga hendir á handilslógarøkinum. – Núverandi lóg verður allíkavæl ikki hildin, so tað er uppá tíðina at vit fáa eina lóg, sum slær fast hvat vit kunnu og ikki, sigur hann**

UPPLATINGARLÓGIN
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

Keypssamtøkuhandlarnir koma ikki undir undantøkini í nýggja lógaruppskotinum, sum í løtuni er til hoyringar, áðrenn tað verður lagt fyri tingið.

Uppskotið sigur, at undantøkini eru handlar, ið selja gerandisvørur og sum hava eitt søluplass, sum er minni enn 250 fermetrar. Undantøkini kunnu hava opið altíð, bæði um næturnar, í vikuskiftum og á heilidøgum, meðan matvøruhandlar, ið eru størri enn 250 fermetrar, skulu vera stongdir frá leygarkvøldið kl 23 til mánamorgun kl 06. Teir stóru handlarnir hava sostatt ikki loyvi at hava opið sunnudagar.

Onkur handilseigari hevur gjørt vart við, at hetta er kappingaravlagandi og at tað líkist ongum, at markið millum undantøk og ikki-undantøk skal vera gólvvíddin á handlinum.




*Finn Nielsen, stjóri í Keypssamtøkuni, gleðir seg til nýggja uppskotið um afturlatingarlótina kemur í gildi. – Tað er tíð uppá at fáa skil uppá hetta økið, sigur hann*
*Savnsmynd*

## Gott uppskot

Men hóast Keypssamtøkuhandlarnir hjá Finn Nielsen eru so mikið stórir, at teir ikki kunnu hava opið sunnudag, so er hann stórliga fegin um, at skil endiliga kemur á upp– og afturlatingarlógina í landinum.

– Sum tað er í dag, er tað tilvildin sum ræður. Vit hava eina lóg, sum greitt sigur, at bert kioskir við avmarkaðum úrvali av matvørum kunnu hava opið sunnudagar. Men lógin verður als ikki tikin í álvara. Sum er, eru tað eisini rættiliga stórir matvøruhandlar, sum hava opið, hóast tað er ólógligt. Ein nýggj lóg fer at sláa fast, hvat er loyvt og ikki, sigur ein ógvuliga avgjørdur Finn Nielsen.

## Longri opið leygardag

Finn Nielsen sigur, at hann avgjørt tekur undir við nýggja uppskotinum, hóast onkur heldur, at tað er kappingaravlagandi. Finn er fullgreiður um, at hann ikki sleppur at hava opið sunnudagar, men hann sigur, at sunnudagarnir ikki eru tað týdningarmesta fyri hann.

– Tað, sum vit veruliga ynskja, er at kunna hava longri opið leygardagar, fyrst og fremst. Tað fara vit at kunna við hesum uppskotinum, og tað er gott, tí tað er stórliga brúk fyri tí. Hyggur tú í handlarnar hjá teimum, sum hava opið leygardag – hóast teir eftir galdanadi lóg als ikki hava loyvi til tað– so sært tú, at teir hava úr at gera. Fólk ynskja at keypa leygardagar, og tað er bara rímiligt, at tey so eisini sleppa tað, staðfestir Finn.

Finn heldur, at tað er átroðkandi við eini nýggjari lóg, og hann heldur, at hetta er eitt sera gott uppskot.

– Sunnudagarnar kunnu vit altíð fara at tosa um seinni, men leygardagarnir eru tað, sum er mest átroðkandi nú, sigur hann. Finn sigur, at tað, at Keypssamtøkuhandlarnir ikki koma undir undantøkini, bert hevur praktiskan týdning sunnudagar.

– Tað er einki í kortunum sum bendir á, at vit fara at hava opið sunnudagar allíkavæl, so tað rakar ikki okkum, staðfestir hann.

Hann leggur afturat, at teir handilsmenn sum eru ónøgdir við, at teir framyvir ikki kunnu hava opið sunnudagar, bert eru teir handilsmenn, sum bróta núverandi lóg

– Og teimum havi eg ikki so ilt av, sigur Finn.

Hann sigur seg bæði vóna og vænta at uppskotið verður samtykt, soleiðis at tað kann koma i gildi skjótast gjørligt.

Avgreiðslan á flogvøllinum steingir í februar:

# Automatikkurin tekur yvir

**Deildin hjá Føroya Banka á Flogvøllinum letur aftur 1. februar komandi ár. Janus Petersen, bankastjóri, sigur, at tørvur ikki er á deildini longur, og at automatikkurin kemur at fylla plássið**

AFTURLATING
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

– Sum er, hava vit eina automat og ein sonevndan infostandara, við eini teldu. Har er møguligt at fara á internetið at søkja sær vitan um t.d. víðari flrogferðslu, Strandferðsluna ella annað. Í Automatini eru danskir pengar, sum so eisini kunnu nýtast í Føroyum. So tey einastu, sum veruliga koma at merkja, at deildin steingir, eru tey, ið frammvegis bert hva bankabók, sigur Janus Petersen um afturlatingina.

## Lítil nýtlsa

Janus Petersen sigur, at avgreiðslan á flogvøllinum er bert opin frá kl 10-13, og at hon verður sera lítið brúkt.

– Tað sum er at gera har, eru serliga vekslingar, og tað eru ikki meiri enn ein ella tvær um dagin. Tørvurin á at hava eina damu sitandi har hvønn dag, er tí ikki serliga stórur. Størsta orsøkin til dalandi nýtsluna av avgreiðsluni er uttan iva hon, at nærum øll fólk í dag hava kort, og teimum nýtist tí ikki at veksla. Kortið kann jú nýtast um allan heimin, sigur Janus Petersen.

Hann sigur, at Føroya Banki tí hevur vurderað, at tíðin ikki arbeiðir fyri avgreiðsluni á Flog-vøllinum.

– Tænastan við automatini og infostandaranum er ein góð tænasta, og tey allar flestu kunnu fáa gleði av henni. Eg vænti tí ikki, at saknurin í avgreiðsluni á flogvøllinum verður nakað serliga stórur, sigur hann.

Janus vísir eisini á, at so leingi sum avgreiðslan er opin, so gera fólk síni ørindi har, ístaðin fyri at nýta automatina.

## Heimsmet í avgreiðslum

Spurdur um hetta ikki fer at hava eina negativa ávirkan á ferðavinnuna, at fólk ikki hava eina bankaavgreiðslu at venda sær til, tá tey koma til landið, svarar Janus ógvuliga avgjørdur, at tað heldur hann ikki.

– Um fólk ikki hava pening til bussin, so kunnu tey taka út úr automatini. Flestu ferðafólk hava jú kort. Vit hava eisini 20 aðrar deildir opnar runt um í landinum, so tænastan er í lagi. Saman við Sparikassanum hava vit væl einar 50 deildir í landinum, og tað er heimsmet pr. innbúgva. So eg haldi ikki, at vit kunnu leggjast undir at leggja fót fyri ferðavinnuna, sigur Janus.

Hann sigur, at aðrastaðni hava tey eina avgreiðslu pr 5.000-10.000 innbúgvar. Her er talið ein avgreiðsla pr. 1000 fólk ella minni.

– Eg vænti ikki, at fólk fara at sakna avgreiðsluna serliga nógv, tí tað verður ikki serliga stórur munur fyri tey flestu. Bert tey við bankabók mugu nú minnast til at orna síni bankaviðurskifti dagin fyri, tey fara avstað, sigur Janus Petersen at enda.



*Janus Petersen, bankastjóri, væntar ikki, at fólk fara at sakna avgreiðsluna á flogvøllinum. – Tey flestu hava jú gjaldskort allíkavæl, vísur hann á*
*Savnsmynd*